# TILTØK

um, Alma Poulsen. ***Vit venja til kappingina, ið verður 18. mars á Nabb. Øll eru hjartaliga vælkomin.***
***Fríggjadagin 17. februar***
kl. 10-13.00 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði
kl. 10-12 Máling og tekning (havi tilfar við). Vegleiðing er á staðnum.
kl. 13.00-17.00 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Tilhaldið á Toftum**
*tlf. 448690*
*er opið frá mánadag-fríggjadag, kl 14.00-18.00.*
***Mánadagin 13. februar***
kl. 15.00 Vit gera bomm
***Týsdagin 14. februar***
Telduprát. Bólkarnir møta sum avtala. Tilhaldið er opið sum vanligt.
***Mikudagin 15. februar***
kl. 15.00-16.00 er sangur, Martin Restorff Jacobsen spælir klaver. Sangbók Føroya Fólks.
Kl. 16.00 er Filmur: Fyrsti partur av Matador
***Hósdagin 16. februar***
kl. 15.00-17.00 Ættarprát. Evnið hesaferð er staðarnøvn á Toftum
***Fríggjadagin 17. februar***
kl. 15.00-16.00 Myndaútskering, Veving, máling. Annars er hvør vælkomin at hava okkurt annað við sær.

*Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks. Øll eru hjartaliga vælkomin í Tilhaldið á Toftum.*

**Tilhaldið Sóljan**
*Klaksvíksvegur 35*
*Klaksvík · tlf. 459091*
Opið er:
Mánadag og mikudag
kl. 13.30-17.30.
Týsdag og Hósdag
kl. 9.30-17.30
Teldupostur:
soljan@klaksvik.fo
soljan@post.olivant.fo
***Mánadagin***
kl. 14.00 Fimleikur
kl. 16.30 Sangur
***Tilm. til týsdagsdøgurðan áðrenn kl. 17 á tlf. 459091***
***Týsdagin***
kl. 9.30 Gongutúrur
kl. 11.00 Vit lesa bløðini
kl. 12.00 Døgurði
***Mikudagin***
kl. 13.30 Telda
***Hósdagin***
kl. 10.00 Fimleikur
kl. 11.00 Telda
kl. 13.30 Vit lesa bløðini.

*Drekkamunnur er at fáa hvønn dag. Møguleiki er at gera ymiskt handarbeiði, spæla kort, bobb, kánus, o.m.a. Bløðini eru altíð til taks. Hvønn dag enda vit við andakt og sangi.*
**Øll eru hjartaliga vælkomin í Tilhaldið Sóljuna**

**Eldrafelagið Nón**
Í vetur koma vit saman til handaligt arbeiði hvønn týsdag frá kl. 15.00 til 18.00.

**Dagtilhaldið í Luffustovu, Fuglafjørður**
*Opið er týs-, miku- og hósdag frá kl. 15.00-18.00*

***Týsdag***
Kort og ymisk spøl
***Mikudag***
Ymisk ítriv
***Hósdag***
Fimleikur
*Hvønn dag drekka við nýbakaðum.*

**Dagtilhaldið Fløvi**
*Í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum.Tlf. 448279.*
Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir. Opið er mánadag til fríggjadag kl. 15-18.
***Mánadagin 13. februar***
Fimleikur og felagssangur
***Týsdagin 14. februar***
Myndaskering v/ Hjalmar Olsen
***Mikudagin 15. februar***
Boccia
***Hósdagin 16. februar***
Myndaveving v. Grethu Olsen
***Fríggjadagin 17. februar***
Byrjandi enskt v/ Anette Gaardlykke

*Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl og bøkur. Tú ert vælkomin at hava títt egna hondarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
er opið mánadag og mikudag frá kl. 13 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Eisini eru bløðuni til taks.
***Mánadagin 13. februar:***
Lættur fimleikur. Upplestur, vit lesa Sornhúsfólkini.
***Mikudagin 15. februar:***
Prát, kortspæl og onnur spøl.

**Vága Pensionistafelag**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til, formannin: Frits Jacobsen, tlf. 332053 ella ein av nevndarlimunum.

**Eldrahugni á Tvøroyri**
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *líkaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh.
tlf. 319630/61 655400.

**Spælistovan í Margarinufabrikkini**
Opið er mánadag, týsdag og hósdag frá kl. 9.00-12.00 fyri børnum/foreldrum uttan ansing.

**Rúslinjan hjá Bláa Krossi**
er opin týsdag og hósdag frá kl. 19.00-21.00.

STARVSLÝSINGAR



## Kundaráðgevar til Vinnulívsdeildina

Vit sóknast eftir kundaráðgevum til vinnulívsdeildina í Havn. Arbeiðsuppgávurnar eru spennandi og fjølbroyttar og fevna um alt samskiftið við vinnulívskundarnar. Arbeiðið á vinnulívsdeildini er skipað í toymi, og tey, ið verða sett, fara at arbeiða í tøttum samstarvi við hinar kundaráðgevarnar á deildini.

Vit leita eftir starvsfelagum, ið dáma væl at hava tætt samband við viðskiftafólk. Vit ynska at veita kundum okkara ta bestu ráðgevingina og tænastuna. Tí mugu evnini at samstarva, samskifta og virka í einum umhvørvi, sum støðugt broytist, vera góð.

Umsøkjarar skulu hava førleika í roknskapargreining og hava viðkomandi útbúgving, eitt nú peningastovnsútbúgving við Finansiel Videreuddannelse ella aðra búskaparliga útbúgving.

Áhugað kunnu seta seg í samband við Gunnar Streymoy, vinnulívsleiðara, á tel. 348630 ella á e-mail gunnar.streymoy@sparikassin.fo ella við Marjun Eystberg, starvsfólkaleiðara, á tel. 348510 ella á e-mail marjun.eystberg@sparikassin.fo.

Starvið verður sett skjótast gjørligt. Lønin verður ásett eftir avtalu.

Skrivligar umsóknir skulu vera starvsfólkadeildini í hendi í seinasta lagi týsdagin tann 21. februar 2006.

Send umsóknina til:

FØROYA SPARIKASSI
Starvsfólkadeildin
Att.: Marjun Eystberg
Yviri við Strond 2
FO-100 Tórshavn

## HR-mennari til Starvsfólkadeildina

Vit sóknast eftir einum HR-mennara til starvsfólkadeildina. Arbeiðsuppgávurnar eru spennandi og fjølbroyttar og fevna um coaching og sparring við starvsfólk, deildarleiðarar og leiðslu. Samskipan av útbúgving í Sparikassanum er eisini ein partur av starvinum.

Í Sparikassanum verður stórur dentur lagdur á fakliga og persónliga menning og at arbeiðsumstøðurnar eru so góðar sum gjørligt. Starvsfólkini eru týdningarmesta tilfeingið hjá Sparikassanum og tað er uppgávan hjá HR-mennaranum at tryggja at tilfeingið verður nýtt á skilabestan hátt.

Vit ynskja okkum ein starvsfelaga, ið hevur hug og evni at arbeiða við menniskjum og dugur at samskifta á ein jaligan hátt.

Umsøkjarar skulu hava viðkomandi útbúgving og førleika innan human ressource.

Áhugað kunnu seta seg í samband við Marjun Eystberg, starvsfólkaleiðara, á tel. 348510 ella á e-mail marjun.eystberg@sparikassin.fo.

Starvið verður sett skjótast gjørligt. Lønin verður ásett eftir avtalu.

Skrivligar umsóknir skulu vera starvsfólkadeildini í hendi í seinasta lagi týsdagin tann 21. februar 2006.

Send umsóknina til:

FØROYA SPARIKASSI
Starvsfólkadeildin
Att.: Marjun Eystberg
Yviri við Strond 2
FO-100 Tórshavn

Visjónin hjá Føroya Sparikassa er at vera brúkaravinaligasti peningastovnur í Føroyum. Í Sparikassanum starvast 211 fólk á 2 vinnulívsdeildum og 16 privatkundadeildum kring um í landinum. Á deildunum veita vit ráðgeving og selja fíggjarligar tænastur, har aðalvirðini eru tryggleiki og brúkaravinsemi. Á vinnulívsdeildini í Havn starvast 10 fólk og á starvsfólkadeildini starvast 3 fólk. Í samtaki Sparikassans eru tvey dótturfeløg: Húsameklarafelagið INNI og Eik Bank.

FØROYA SPARIKASSI